# SPYRST SO LIVST

RIGMOR DAM

Tríbarnamamma, kona, lærari, journalistur og redaktørur á lívsstílsblaðnum *Rákið* svarar spurningum til brævkassan **SPYRST SO LIVST**



*Redaktiónin loyvir sær at velja og vraka millum innsendu spurningarnar*

Hevur tú brúk fyri einum góðum ráði, so send spurningin til:
Sosialurin
SPYRST SO LIVST
postboks 76
FO-100 Tórshavn
**ella teldupost til rigmor@sosialurin.fo**

### Góða Rigmor

*Eg skrivi til tín, tí eg eri í dýrastu neyð.*

*Ein gomul skyldkona hjá mær er ógvuliga óhjálpin heima, og ongin varandi loysn er í eygsjón. Hon fær bara heimahjálp nakrar tímar um vikuna, men tað er ikki nóg mikið, tí hon er so lamin, og vit hava varhugan av, at hon er við at blíva dement. Haraftrat er hon einkja, og børn hennara búgva øll uttanlands.*

*Hvat skulu vit gera? Skyldkonan stendur á bíðilista, men vit fáa bara at vita, at onnur eru nógv verri fyri enn hon.*

*Onkur hevur sagt mær, at tað einasta, sum hjálpir, er at kenna røttu fólkini, og harvið hava røttu knapparnar at trýsta á. Vónandi passar tað ikki.*

*Hevur tú nøkur ráð?*

***Eitt frustrerað skyldfólk***

### Góða frustreraða skyldfólk

Tað er ein vanlukkulig støða, sum tit og skyldkonan eru komin í. Eg havi ongi góð ráð til tykkara sum so, tí støðan á eldraøkinum í mongum førum er so vónleys, at har hómast fáir batar - tíverri.

Eg vildi ynskt, at eg kundi beint tykkum til avvarðandi myndugleikar, ið sum kunnugt bjóða summum borgarum góðar sømdir, meðan aðrir enda aftast á bíðilistanum. Havi ongantíð skilt, at plássgaranti ikki er lógarfest í sambandi við vælferðartænastur. Tí hví skulu summir borgarar hava kreditt fyri skattakrónurnar, meðan aðrir mugu lúta? Skal rættvísi verða, mugu antin øll ella ongin hava tilboð.

Kanska hevði tað verið eitt hugskot at sett á stovn eina »eldravernd«, eins og barnavernd, sum kundi tryggjað, at eldri borgarar ikki líða vanrøkt. Hesin stovnur kundi so havt heimild at farið inn í heimini, og at álagt myndugleikunum at seta stuðlar í heimið, líka til tann eldri og óhjálpni fekk pláss á einum heimi. Tað gera vit eisini við onnur óhjálpin, til dømis tey, sum eru fjølbrekað.

Eg vil ikki trúgva, at tað hjálpir at kenna tey røttu fólkini, sum tú sigur. Vil heldur ikki trúgva søgunum um, at umsøkjarar verða sendir aftast á bíðilistan, um teir eiga vaksnar døtur. Men man hoyrir so nógv.

Sum støðan er nú, noyðist tú helst at senda boð eftir vaksnu børnunum, hóast tey búgva uttanlands. So mugu tey skiftast um at koma heim at vera um mammuna nakrar vikur í senn. Tey eru tey nærmastu at átaka sær uppgávuna.

Við vón um eina skjóta og góða loysn til tykkara.

***v. rigmor***

---

### Góða Rigmor

*Vit eiga 2 børn undir skúlaaldur, so tað kunnu vera nógvir strævnir dagar, tá øll skulu avstað til arbeiðis og á stovn um morgunin. Eg royni tó at vera positiv og glað, men eftir mínum tykki er maðurin rættiliga ofta súrur og í ringum lag um morgunin. Eg orki ikki fyri tí, tí eg haldi tað er týdningarmikið hjá børnunum at byrja dagin gott og positivt.*

*Eg havi sagt tað 1000 ferðir við hann, men hann heldur ikki at tað er so galið. So eg eri bangin fyri, at tað er hansara persónligheit.*

*Hvat heldur tú, at eg skal gera?*

***Heilsan morgunmamman***

### Góða morgunmamma

Ein persónur við morgungron fyllir so nógv, at tað er lættari at vera hann fyriuttan. Morgungron er negativ energi, og maður tín hevur ikki rætt til at oyðileggja morgunin og dagin hjá tær og børnunum.

Eg haldi, at tú skalt krevja av honum, at hann velur: 1. At flyta út. 2. At taka seg saman. 3. At halda seg burtur frá tykkum um morgunin.

Helst velur hann tað síðsta, tí so sleppur hann at verða liggjandi í songini og jolla sær og eta jogurt og vakna spakuliga, sum helst hóskar ordiliga væl til hansara lyndi.

Tit kunnu so avtala, at hann tekur eina eyka hond við kvøldið fyri, so tað lættir um hjá tær, tá tú skalt avstað við riðilinum um morgunin. Til dømis kann hann smyrja matpakkar, rudda gongina, leggja klæðir saman og upp á pláss, gera útiklæðini klár til børnini, pakka skiftiklæðir í taskurnar og alt hitt, sum ger morgunin til ein hurlivasa. Hann kann enntá smyrja morgunmatpakkar til tykkara, so tú bara skalt lata tykkum í og so avstað um morgunin. Tú kanst so gera skilnaðarløtuna til eina hugnaløtu í stovninum, har tú etur saman við børnunum, áðrenn tú fert til arbeiðis.

Á hendan hátt møtast tit á miðjuni: Tú góðtekur hansara serheitir, og hann sleppur undan morgunrokinum.

Tí lívið er simpulthen ov stutt til morgungron.

***v. rigmor***

---

### Hey Rigmor

*Eg eri ein 14 ára gomul genta. Fyri nøkrum vikum síðani sá eg ein eingil úti í garðinum hjá okkum. Hann var hvítur og stórur og hevði langt hár. Eg bleiv so glað, tí hann sá so góður út og nú trúgvi eg upp á einglar.*

*Men mamma trýr mær ikki. Hon heldur, at eg lúgvi, og so blívi eg kedd, tí tað passar.*

*Tað er so irriterandi, tí nú tori eg næstan ikki at siga tað við vinkonurnar. Hvat heldur tú um hetta?*

***Heilsan AJ***

### Góða AJ

Tú hevur sæð ein eingil og soleiðis er tað. Tú veitst at tað passar, og tí passar tað fyri teg. Tú skalt slett ikki ganga so høgt uppí um onnur trúgva tær ella ikki. At síggja ein eingil er ein positiv og persónlig uppliving, sum ongin kann ella skal taka frá tær. Goym eingilin inni í hjartanum sum ein góðan dýrgrip, sum tú kanst hava við á lívsleiðini. Kanska var tað ein meining við, at júst tú skuldi síggja hann? Sum tú sjálv sigur, so bleivst tú so glað og tað er gott.

Alt tað besta.

***v. rigmor***

---

# Málsligt máttloysi

Málstrikan — MÁLFELAGIÐ

Útvarpið visti at siga, at onkur úlendingur kanska fór at blíva sendur av landinum **»við megi«**.

Hvat er hetta? Føroyingar hava altíð sagt »við makt«. – Vil onkur ófriðargestur ikki fara við góðum, so skal hann fara við illum, kann ein rísin húsbóndi siga, og tá meinar hann, at hann ætlar at brúka makt.

Makt er eitt felagsgermanskt orð, sum er at finna í ymsum formum í øllum germanskum málum. Vit hava tað í formum sum 'maktarloysi', 'maktast', maktboð og onnur. Vit hava tað í gerandismáli (av allari makt) og í skaldskapi: Tú tekur ikki Ormin langa við danskari makt aleina.

*(MT)*